# Í Óðamansgarði á pall í Íslandi

**Í kvøld er frumsýning av føroysku operuni í Óðamansgarði í Tjóðleikahúsinum í Reykjavík**

OPERA



Verkið skal framførast í samstarvi við Tjóðpall Føroya og Íslendska Tjóðleikhúsið. Báðar framførslurnar eru partur av Listarhátíð Íslands, ið mann metast at vera stórsta listatiltak íslendinga.

Operan Í Óðamansgarði eftir føroyska tónaskaldið Sunleif Rasmussen, varð upprunaliga skrivað til tónleikabólkin Aldubáruna í sambandi við 10 ára hátíðarhaldið hjá bólkinum.

Dánial Hoydal hevur skrivað leikritið útfrá stuttsøgu hjá Williami Heinesen frá 1960. Leikritið var liðugt í 2006, og operan varð fyrstu ferð sýnd í Norðurlandahúsinum í oktobur 2006.

Framførslurnar eru í Tjóðleikhúsinum, og Heðin Mortensen verður til framførsluna. Úr Íslandi vera bæði forseti, forsetisráðharri og borgarstjórar.

Tónleikarar verða: Sámal Petersen, Jón Festirstein, violin - Angelika Nielsen, bratsj - Tóri Restorff Jacobsen, sello - Agnar Lamhauge, kontrabass - Andrea Heindriksdóttir, floytu, Ármann Helgason, klarinett, Eyðdis Franzdóttir, obo - Christina Andersen, fagott - Stefán Jón Bernharðsson, horn - Johan Hentze, trompet - Andras Olsen, trombon - Jóhannes Andreasen, ljómborð - Ólavur Jakobsen, gittar - Mathias Seibæk, slagverk. Dirigentur: Bernharður Wilkinson

Har umframt er Sunleif Rasmussen tónaskald, Dánial Hoydal hevur skrivað tekstin, leikstjóri er Ria Tórgarð, koreografur er Lára Stefánsdóttir, sopran er Þóra Einarsdóttir, tenor er Eyjólfur Eyjólfsson, bassur er Bjarni Thor Kristinsson og sjónleikarar er Gunnvá Zachariasen og Hans Tórgarð.

## 007 ímóti hvalaveiði

Tann heimskendi írski filmsleikarin Pierre Brosnan, sum helst er serliga kendur fyri sín leilut sum James Bond, elvdi til nógv orðaskifti í fjølmiðlunum, tá hann í síðstu viku vitjaði í Hvítu Húsunum í Washington við tí fyri eyga at banna allari hvalaveiði. Í Hvítu Húsunum fekk Pierre Brosanan møguleikan at hitta fjølmiðlarnar, og hann nýtti eisini høvið til at siga sína hjartans meining. Millum annað bað hann amerikonsku stjórnina seta seg í samband við stjórnirnar í Noregi, Íslandi og Japan fyri at fáa tey trý londini at gevast við vinnuligu hvalaveiðini alt fyri eitt.







# ÍBÚÐIR í RUNAVÍK 2.BYGGISTIG

Snið **A**, 52m2 + 4m2 úthús [**forstova, vesi/brús, kamar, køkur – spísistova – stova**]

Snið **B**, 71m2 + 4m2 úthús [**forstova, vesi/brús, kamar, dupult kamar, køkur – spísistova – stova**]

Snið **C**, 85m2 + 5m2 úthús [**forstova, vesi/brús, 2 kømur, dupult kamar, køkur – spísistova – stova**]

Snið **D**, 121m2 + 5m2 úthús [**forstova, vesi, køkur – spísistova – stova, loftsgong/trappurúm, skápsrúm, vesi/brús, 2 kømur, dupult kamar**]







**KOSTNAÐUR**

| | Bruttoprísur | Nettoprísur |
|---|---|---|
| A | 1.083.000 kr | **975.000 kr** |
| B | 1.306.000 kr | **1.175.000 kr** |
| C | 1.417.000 kr. | **1.275.000 kr** |
| D [raðhús] | 1.645.000 kr | **1.495.000 kr** |

Meiri fæst at vita við at seta seg í samband við okkum á tlf. 21 78 85 • Innrætting og myndir – sí www.fuglark.fo • Sp/f VIST vist@vist.fo